Aldri tann dagur

C dur - g

1/4.
C                              F                    C
Aldri tann dagur úr huga mær rennur,
C                                            G
frelsarin, Jesus, í hjartað kom inn.
C                                   F                  C
Sálanna streingir hann yndisligt spennir,
C                             G7        C
lovsongur ljómar í sál og í sinn.

Niðurlag:
G                         C
Undurfulla náði, undurfulla náði:
D7                                         G
frelsti ein syndara slíkan sum meg!
C                          F
Undurfulla náði, undurfulla náði:
C                             G              C
frelsti ein syndara slíkan sum meg!

2/4. Trúliga vardur við kærleikans bondum,
ei skal tí fjøtra meg djevulsins garn.
navn mítt er ritað í báðum hans hondum,
og alt av náði eg eri hans barn.

3/4. Á, mitt í syndara ótalda skara
valdi hann meg til sín bróður og vin.
Loystur úr syndanna leinkju og snaru,
aftur tí syngur mín sál og mítt sinn:

4/4. Harri, ei fata eg kann tína náði,
sjálvkravdur legði tú krossin á teg.
Golgata gátu eg ongantíð ráði,
– frelsti ein syndara slíkan sum meg.